## Manskórið á Matiné í Havnar Kirkju

MATINÉ

Í dag, leygardagin kl 11:30 fer Tórshavnar Kamarkór at hava fjølbroytta konsert í Havnar kirkju.

Kórið hevur fleiri ferðir verið við til gudstænastur og hátíðarhald – seinast var á ólavsøku í ár.

Tað er Kári Bæk, sum stjórnar kórinum, og á skránni eru verk eftir Grieg, Rachmanninov, Stenhammar, Leif Hansen, Kára Bæk og øðrum.

## Flatoyringar takka føroyingum

MINNINGARDAGUR

Mikudagin 26. oktober minntust flatoyringar, at 10 ár eru liðin síðani ta stóru vanlukkuna, tá ið skalvalop rakti bygdina, og 20 av bygdafólkunum lótu lív.

Í hesum sambandi var minningarhald í ítróttarhøllini. Vigdís Finnbogadóttir, fyrrverandi forseti Íslands, flutti fram røðu, tónleikur og yrkingar vóru framførd, og sóknarpresturin bað eina bøn.

Í kirkjuni kundu fólk halda eina stilla løtu í bøn og minnast tey, ið doyðu.

Hendan dagin hugsaðu Flatoyringar við takksemi um tað stóru gávu, ið teir fingu frá sínum grannum og vinum í Føroyum. Tann vakri bygningurin, har barnagarðurin Grønigarður heldur til, hevur hesi árini eftir vanlukkuna havt stóran týdning fyri bygdina.

Barnagarðurin var eitt av teimum støðunum, har Vigdís Finnbogadóttir vitjaði.

Flatoyringar takka av heilu huga fyri vinarlag, vísta samkenslu og tann ómetaliga stuðul, sum føroyingar lótu til uppbyggingina eftir skalvalopið í 1995, sigur fyrireikingarnevndin.



*Bente Kjær, kirkjuráðslimur og Sonja Klein, prestur, framman fyri Havnar Kirkju. Høgrumegin síggjast Arnes Minde, húsini, har dagrøktin hjá Tórshavnar Kommunu heldur til _ har børnini verða ansað, meðan foreldrini eru í kirkju*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

# Havnar Kirkja skipar fyri barnaansing

**Havnar Kirkja kemur nú við einum barnaansingartilboð. Talan er um eitt tilboð til foreldur, um at fáa børnini ansað meðan tey eru í kirkju**

KIRKJA

*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*

Frá fyrsta sunnudegi í advent, 27. november, fer at bera til hjá kirkjufólki í Havn at fáa børnini ansað, meðan tey eru í kirku. Talan er um skipaða barnaansing, sum verður í hølunum hjá dagrøktini hjá Tórshavnar Kommunu í Arnesminde – grannahúsunum hjá Havnar Kirkju.

Hetta er eitt hugskot, sum fólk eru komin við, ið eru von at ganga í kirkju í Danmark. Har er tað onkustaðni vanligt, at børnini verða ansað, meðan foreldrini eru í kirkju, siga Sonja Klein, prestur í dómkirkjuni, Havnar Kirkju og Bente Kjær, kirkjuráðslimur.

Tær hava júst gjørt avtalu við Tórshavnar Býráð um at læna hølini, og hevur býráðið víst ætlanini sera stóra vælvild, siga tær. Tey í Havnar Kirkju skulu útvega fólk at ansa børnunum _ og talan verður um sjálvboðið arbeiði.

– Men hetta er altso bara eitt tilboð til foreldur. Tað skal endiliga ikki skiljast soleiðis, at fólk nú ikki kunnu hava børnini við í kirkju, tí tað eru tey vælkomin til, siga tær, og leggja stóran dent á, at talan bara er um eitt tilboð, so børnini ikki skulu halda foreldrum aftur í at fara í kirkju.

Júst hvussu stórur tørvurin er á slíkari ansing, vita tær ikki. Men fólk hava vent sær til teirra við hugskotinum, og tí hava tær í eina tíð arbeitt við tankanum, sum nú verður veruleiki.

Hóast talan er um barnaansing og ikki barnagudstænastu, so verður kortini okkurt kirkjuligt lagt í børnini hesa løtuna, tað veri seg við sangi, søgum ella øðrum.

Sonja Klein, prestur, sigur tað als ikki vera nakran trupulleika, at børnini eru við foreldrum í kirkju. Tí børn eru ymisk, og foreldur eru ymisk.

– Men veruleikin er tann, at vit missa tey foreldur úr kirkjuni, sum ikki hætta sær við børnunum, og sum ikki hava nakran at ansa teimum hesa løtuna. Tað er til teirra, hetta tilboðið er, sigur Sonja Klein, sum samstundis fegnast um, at Dómkirkjan kann ganga á odda við einum slíkum nýskapandi tiltaki.

# Havnin í øldir í Smiðjuni

FRAMSÝNING

Í dag, leygardagin, letur upp ein áhugaverd myndaframsýning í Smiðjuni í Lítluvík. Sýndar verða myndir av gomlu Havnini og havnarfólki.

Framsýningin, ið ber heitið **»Havnin í øldir«**, er skipað av Beintu Háberg Jacobsen, og hongur framsýningin upp til 1. november.

Opið er allar dagar kl. 15 - 20, og har verður eisini tónleikur at hoyra.

<u>Leygardagin kl. 16.00:</u> Petur Háberg Jacobsen og Kári Holm Olsen

<u>Sunnudagin kl. 16.00:</u> Monica Stauss og Ólavur Jakobsen

<u>Mánadagin kl. 18.00:</u>
Tey á Kamarinum

<u>Týsdagin kl. 18.00:</u>
Maria Andersen.
Øll eru hjartaliga vælkomin á framsýningina, siga fyrireikararnir.

